# Semja um yvirtøku



Tað var full semja í grønlendska Landstinginum fríggjadagin, tá tingið hevði 1. viðgerð av einum uppskoti frá landsstýrinum um at yvirtaka ábyrgdina av ráevnunum í undirgrundini. Framsøgufólkini hjá øllum flokkum tóku undir við, at landsstýrið skal fáa heimild til at halda fram við samráðingunum við donsku stjórnina við tí fyri eyga, at málsøkið verður yvirtikið 1. januar 2010. Ove Karl Berthelsen, landsstýrismaður í tilfeingis- og vinnumálum, segði undir orðaskiftinum, at tilhongdin í málinum hevur verið drúgv, men at nú eru bara mánaðir eftir til ta søguligu løtuna.

# Grópa vøllin upp



*Djúp bilspor eru í grasvøllinum á Lærarasskúlanum eftir at onkur um vikuskiftið hevur stytt sær stundir við at koyra inni har*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Onkur bilførari hevur havt sær til frægd, at koyra inni á grasvøllinum við Lærarskúlan, har grov spor standa eftir**

HERVERK
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Tá fólk møttu til arbeiðis á Lærarskúlanum í morgun, løgdu tey til merkis, at djúp bilspor stóðu í gravsøllinum við skúlan.

Onkur hevur havt sær til frægd at koyra inni á grasvøllinum, og harvið gjørt herverk á vøllin.

Húsavørðurin á Lærarskúlanum sigur, at tað kemur fyri, at koyrt verður á knallert inni á vøllinum. Ungdómar hava til frægd at koyra á vøllinum, serliga tá vátt er í veðrinum. Men hesaferð er kortini talan um bilspor.

Húsavørðurin sigur, at tað er ikki vanligt, at bilar fara inn á vøllin at koyra. Tað ber kortini til at sleppa inn á grasvøllin við bili, um koyrt verður umvegis Nóatún.

- Portrið, sum var fyri, bleiv brotið í heilum, so vit góvust bara at seta tað upp aftur. Annars ber ikki til at sperra vøllin heilt av, tí vit mugu sleppa inn á hann at sláa hann, sigur húsavørðurin.

Hann sigur, at fyri einum fimm árum síðani hevði onkur stolið ein bil og koyrt inni á vøllinum. Men biltjóvarnir høvdu verið so óhepnir, at bilurin steðgaði upp og varð standandi á vøllinum.

Sum sæst á myndini er talan týðiliga um bilspor, og tey eru greflig á at líta.







t.d.
**Blitz-Kerner seyðabyrsur**
Forniklaðar *(Brúnar kr. 895,-)*




**... og mangt mangt annað!**

Pf Jógvan Weihe

STIÐJAGØTA 10 • TÓRSHAVN • TEL 353897 • FAX 353898
WWW.JOGVAN-WEIHE.FO